## Vágs skúli

# Lærarastarv í Vágs skúla

Í Vágs skúla er eitt tíðaravmarkað lærarastarv at søkja frá 1.januar 2009 til 30. juni 2009 við 19 tímum um vikuna fyri lærara, ið fer frá vegna aldur.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjamálaráðið.

**Umsøkjarin skal kunna átaka sær:**

- Danskt í 9. fl.
- Søgu/samtíð í 9.fl.
- Danskt í 6.fl.
- Søgu í 6.fl.
- Tónleik í 6.fl.
- Tónleik í 3.fl.
- Tónleik í 2.fl.
- 4 stuðulstímar í svimjing

**Søkt verður eftir lærara, sum**

- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans.
- Duga at samstarva og er fyrikomandi
- Er fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- Er stundisligur og nærlagdur

**Førleikakrøv**
Lærarαútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi mánadagin 24.nov.2008 kl. 10.00.

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Óla í Hjøllum, skúlastjóra, á tlf. 373192 ella 374066.

Í Vágs skúli eru 223 næmingar í 12 flokkum. Í skúlanum starvast 24 lærarar.

**Vágs skúli**
Vágsvegur 32
900 Vágur

---

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.

Føroya Skiftirættur hevur tann 5. septembur 2008 avgjørt, at P/f Horisont, 530 Fuglafjørður, skrásetingarnr. 2119, sum er tvingsilsavtikið, skal fara í likvidatión við undirritaða sum likvidator.

Ognarar felagsins verða bidnir um innan 3 mánaðir frá í dag at fráboða krøv síni mótvegis undirritaða saman við neyðugum skjalprógvum.

*Tórshavn, tann 4. novembur 2008*

**Niels Winther Poulsen, adv.**
Frúutrøð 4 · 100 Tórshavn

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

---

# fk Matseðil

Hósdagin 6. november
**Hakkibúffur / Høsnarungabringa**

Fríggjadagin 7. november
**Rullusteik / Chilli con Carne**

Leygardagin 8. november
**Svínakambur**

Mánadagin 10. november
**Kjøtfrikadellur / Rivjasteik**

Týsdagin 11. november
**Hunangsglaserað skinka / Bollar í karry**

Mikudagin 12. november
**Nakkasteik / Stoktur fiskur**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**

---

## SUMBIAR KOMMUNA

# KUNNGERÐ

**Til veljarar til kommunuvalið tann 11. november 2008 í Sumbiar kommunu.**

Atkvøðugreiðslan fer fram týsdagin 11. november 2008 á hesum støðum:

**Fyri veljarar í Sumba og Víkarbyrgi:**
**á kommunuskrivstovuni í Sumba**

**Fyri veljarar í Lopra og Økrum:**
**í Bygdarhúsinum í Lopra**

Atkvøðugreiðslan fer fram millum kl 10.00 og kl. 20.00 og heldur fram, so leingi veljarar møta uttan steðg.

Veljarar, ið sambært vallógina hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøðu á kommunuskrivstovuni til og við mánadagin 10. november 2008.

Tey, ið vegna sjúku ella væntandi førleika ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima til og við dagin fyri valið. Hesi kunnu boðað kommunuskrivstovuni frá hesum á tlf. nr. 370344, 373506 ella 370006 í seinasta lagi mánadagin 10. november kl. 15.00.

Gjørt verður kunnugt, at valkort verða send øllum veljarum, ið standa á vallistanum. Veljari, sum ikki fær valkort, ella fær valkort við villum í, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna sum skjótast.

*4. november 2008*

**Valnevndin í Sumbiar kommunu**

---

## Sethús til sølu í Norðragøtu

Vídd 160 m² í einum plani.
Byggiár 2002.
Húsini eru stoypt upp, vindeygu og hurðar eru úr timburi, taki svart alumineum við tøttum tróðuri.
**Rúm:** Gongd, baðirúm, 2 barnakømur, køkur, grovkøkur, stova og hjúnarrúm við atgongd til vesi gjøgnum skápsgongd.
Bilhús vídd 28 m² leyst frá húsunum.

**Ring tel 442120 ella 227173**

---

SUNDA KOMMUNA

# Atkvøðugreiðsla til kommunuvalið og skúlastýrisvalið í Sunda Kommunu

Val til kommunstýrið verður hildið týsdagin 11. novembur 2008. Atkvøtt verður millum kl. 9.00 og 20.00 og hildið verður fram, so leingi veljarar møta uttan steðg.

Samstundis verður val til skúlastýrini í kommununi, her í millum Felagsskúlan á Oyrarbakka, har foreldur, ið hava valrætt, kunnu atkvøða.

**Valt verður á hesum støðum:**

- Veljarar búsitandi við Gjógv velja í skúlanum við Gjógv
- Veljarar búsitandi við Norðskála, á Oyrarbakka og á Oyri velja í Eydnuni á Oyrarbakka
- Veljarar búsitandi í Tjørnuvík velja í skúlanum í Tjørnuvík
- Veljarar búsitandi í Haldórsvík og á Langasandi velja í skúlanum í Haldórsvík
- Veljarar búsitandi í Streymnesi, Saksun og í Hvalvík velja í skúlanum í Hvalvík
- Veljarar búsitandi í Hósvík velja í skúlanum í Hósvík

**Brævatkvøða:**
Veljarar, ið sambært vallógini hava rætt til at velja við brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð mánadag til fríggjadag millum kl. 8.00 og 16.00, tó mikudag millum kl. 10.00 og 16.00, til og við mánadagin 10. novembur 2008.

Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðið, og sum ynskja at greiða brævatkvøðu heima, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 737271 í seinasta lagi 10. novembur 2008 kl. 16.00.

**Valkort:**
Valkort verða send veljarunum í kommununi við postinum. Um onkur, sum heldur seg hava valrætt, ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at seta seg í samband við kommunuskrivstovuna sum skjótast.

Minnist vinarligast til at hava valkortið við á val.

*Oyrarbakki tann 30. oktober 2008*

**Sunda kommuna**
Postboks 10
Oyrarbakkavegur 3
400 Oyrarbakki

---

**Tørvar tær vælgjørdan**

# TIMBURMANN?

**Ring so til J.T.D. Smíð**
**v/Hera Thomsen tlf. 21 93 18**

**J.T.D. SMÍÐ**